Filmur

## DVD-ummæli




**Click** við Adam Sandler er um Michael sum fær eina universal-fjarstýring, ið ger, at hann kann stýra øllum heiminum. Við eitt kann hann stýra konuni, spæld av Kate Beckinsale (Pearl Harbor) og stjóranum David Hasselhoff (Knight Rider). Børnini, tí hann kann steðga tíðini, spæla ella seta alt í slow-motion o. s. fr. Onkuntíð gott undirhald. At enda er onkur moralsk fløkja, men sum heild er hetta bara gott undirhald.
3 stjørnur av 6.




Ringasti filmurin gjørdur í 2006 má vera hesin **Little Man**. Hann er so smakkleysur og super elendigur, at hann hevur fingið eina virðisløn. The Razzie awards, sum er sum ein Oscar fyri vánaligar filmar (Worst Remake Or Rip-off: Little Man).. Hann er so ræðuligur, at hann er vorðin eitt sindur kult. Calvin Simms er ein dvørgur, ið ikki er størri enn eitt 3 ára gamalt barn. Hann er ein brotsmaður og, ja søgan hongur ikki saman og øll spæla av h… til. 94 pínligir minuttir.
Tekstir: danskur, svenskur, norskur, finskur
Format: 16:9, 1:85:1. Dolby Digital 5.1
0 stjørnur av 6
(kann ikki geva minus stjørnur).




**Offscreen** er ein originalur danskur filmur. Christoffer Boe leikstjórnaði hann. Nicolas Bro spælir ein óhugnaligan leiklut sum sjónleikarin Bro, ið skal gera ein film fyri leikstjóran Boe. Hjúnarlagið hjá Bro er vánaligt og hann vil gera ein film um tey, fyri at vinna konuna Lone aftur. Hann byrjar at filma og ger øll svøk við síni filming. Tá konan rýmir frá honum og flytur til Berlin, upployst Bro og gerðst meiri og meiri svakur. Nicolas Bro spælir, so tað er ótrúligt. DVD-útgávan er einki serligt tó.
93 minutter. Mál: danskt. Format: 1:85:1 Dolby Digital 5.1
Special features:
Kommentarspor við Mor Boe og mor Bro Trailer & teasers
6 stjørnur av 6

Ghost Rider:

# Enn ein teknirøð frá Mervel sum filmur

## Ummæli



Kim Simonsen
kimsimonsen@hotmail.com



Marvel hava stórframleitt teknirøðir og figurar, ið vit kenna sum t. d. The Shadow, Mandrake, Fantomet, Superman, Captain America, Captain Marvel, Flash, Spectre, Hawkman, Sandman, Green Lantern og eisini Ghost Rider.

Hesin Ghost Rider, leiktur av óføra Nicolas Cage, ynskir sær so brennandi at vinna, at hann ger ein sáttmála við hin grábeinta. Hetta er eitt gamalt tema frá Faust og fram eftir.

Johnny Blaze er so ungur, at hann vil gera alt fyri at fáa heiður, æru, pening og vald, at hann ger ein slíkan sáttmála við fanan sjálvan, undirskrivaðan við blóði.

### Johnny Blaze gerst Ghost Rider

Tað er sum í øllum góðum ævintýrum um unga mannin, at tá hann gerst forelskaður og skal út í heimin at finna seg sjálvan, so koma trøllini. Eisini hjá Johnny kemur Mephistopeles at krevja kontraktina, og Johnny Blaze endar sum Ghost Rider. Hann skal nú fanga Blackheart og aðrar demonir fyri Mephistopeles.

Nógvar superhetjur eru genialar, tí tær bera júst sorgina í barmi. Tær hava longu mist alt, og eru tí ikki bangnar fyri nøkrum. Tær eru fullar í avmakt, hatri og vónloysisøði. Sum so er eingin munur á Batman, King Lear ella Hamlet, dananum – hetta duga fólk bert ikki at síggja, men hetta er ikki ein serliga væl gjørdur filmur. Sjálvt ikki teir mest "die hard" fans av hesi røðini, koma at dáma handan filmin.

Cage yvirspælur so nógv, at tað er ikki løgi at hann stendur í ljósum loga. Hetta er ikki Marvel, tá tað er best, men botnurin í skuffuni er hervið gjørdur til film.

## Fakta um Ghost Rider

**Leikandi**:
Ghost Rider
Roxanne Simpson
Blackheart
Mephisto
Nicolas Cage
Eva Mendes
Wes Bentley
Peter Fonda

Leikstjóri Mark Steven Johnson. Frumframsýndur í Havnar Bio 2. mars. 114 minuttir. Aldursmark: loyvdur øllum yvir 11 ár.

Parfumen: Historien Om En Morder
Leikandi: Ben Whishaw, Dustin Hoffman, Alan Rickman, Rachel Hurd-Wood.
Leikstjóri Tom Tykwer. 2 tímar og 28 minuttir. 15 ára aldursmark. Havnar Bio frá 23. februar.




### American Splendor

Ein sera áhugaverdur filmur er American Splendor, ið júst er útkomin á DVD. Hann er um teknaran Harvey Pekar, ið skapti realistisku kult-teknirøðina og blaðið American Splendor í 70inum. Harvey Pekar er ein tunglyndur nørdur og hann keðir seg í einum keðiligum býi. DVD-útgávan inniheldur spennandi eykatilfar.
5 stjørnur av 6




### The Squid and the Whale

Bernard Berkman (Jeff Daniels) er ein útbrendur høvundi. Konan vil skiljast og hennara egna navn sum rithøvundur er vaksandi. Hetta er ein søga um øvund, um fáfongd og børn og vaksin í sorg. Filmurin hveur fingið nogvar virðislønir m.a. frá Sundance-Festivalinum. Hann er ein lítil klók dramatisk søga um ymiskar lagnur. Ein perla.
5 stjørnur av 6.




### Romance & Cigarettes

Ein løgin musical um arbeiðarar og teirra lív. Nick (James Gandolfini kendur frá The Sopranos) er arbeiðari í New York og giftur við reyðhærdu Kitty (Susan Sarandon). Hann hevur møtt Tula (Kate Winslet). Tá konan uppdagar hetta gerðst hon frá sær sjálvum. Romance & Cigarettes er ein sera løgin, men stuttligur filmur. Hann er gjørdur av kenda sjónleikaranum John Turturro og er á tremur av kendum leikarum. DVD-útgávan er einki serligt, her eru eingir eyka møguleikar sum so.
4 stjørnur av 6.




### Don´t Come Knocking

Nýggjasti filmurin hjá Wim Wenders eitur "Don´t Come Knocking" (2005). Her er americana romantikkur og ein meistarlig søga um forfall, tí ikki bert er Sam Shepard í hesum filminum "an hasbeen", men býirnir hann vitjar eru tað eisini og øll vita tað. Her eru long tablouir við vøkrum melankolskum tónleiki, Hetta er ein føddur filmklassikari og eitt meistaraverk.

6 stjørnur av 6

sosialurin